Løgmálaráðið

Dagfesting:	28.11.2025
Mál nr.:	25/02157-26
Málsviðgjørt:	EM/BF
Ummælistíð:	03.09.2025 – 01.10.2025
Eftirkannað:	24.11.2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkayvirlit
(Atgongd hjá ríkismyndugleikum til upplýsingar í Landsfólkayvirlitinum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 41 frá 8. mai 2007 um fólkayvirlit, sum broytt við løgtingslóg nr. 36 frá 6. mai 2011 og § 63 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verður aftan á § 31 í kapittul 8 sett:

"**§ 31 a.** Ríkismyndugleikar í Føroyum eru í hesum kapitli javnsettir við aðrar almennar myndugleikar."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Sambært galdandi løgtingslóg um fólkayvirlit er eingin heimild at lata ríkismyndugleikum í Føroyum upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum.

Ríkismyndugleikar í Føroyum eru Ríkisumboðið, Føroya Politi, Føroya Rættur, Kriminalforsorgin, Landslæknin og Arktisk kommando.

Heildarætlanin hjá Talgildu Føroyum, *Talgilding av samfelagnum heldur fram, heildarætlan fyri talgilding av samfelagstænastum árini 2025-27*, sum liggur til grund fyri *Løgtingslóg um Talgildu Føroyar 2.0,* varð samtykt í apríl 2025.

Sambært átaki 11 í heildarætlanini skal arbeiðast fyri, at ríkisstovnar í Føroyum kunnu brúka loysnirnar hjá Talgildu Føroyum til at veita føroyingum sínar tænastur talgilt. Talan er t.d. um Føroya Politi og Føroya Rætt, ið hava ynski um at veita sjálvavgreiðslur á Vanganum og at senda brøv í Mínboks. Hetta kann t.d. vera at biðja um revsiváttan á Vanganum og fáa parkeringarbót sendandi beinleiðis í Mínboks.

Fyri at átakið kann røkkast, er tað ein fortreyt, at hesir stovnar fáa atgongd til neyðugar upplýsingar í Landsfólkayvirlitinum, tí talgildu loysnirnar eru knýttar í upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum.

Neyðugt er tí við lógarbroyting, har greið heimild til endamálið fæst til vegar.

Til samanbering kann nevnast, at føroyskir myndugleikar sambært donsku cpr-lógini hava heimild til beinleiðis at heinta upplýsingar úr CPR.

§ 34 a í donsku CPR-lógini er soljóðandi: Færøske myndigheder sidestilles i dette kapitel med andre offentlige myndigheder.

1.2. Galdandi lóggáva

Í § 1, nr. 4 í løgtingslóg um fólkayvirlit er ásett, at lógin hevur til endamáls at tryggja, at upplýsingarnar í Landsfólkayvirlitinum á hóskandi hátt kunnu latast almennum myndugleikum ella privatum, ið hava heimilaðan áhuga í hesum.

Í kapitli 8 í lógini er nærri ásett, hvussu og undir hvørjum treytum upplýsingar kunnu latast víðari til almennar myndugleikar.

Har er m.a. ásett, at upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum og gomlum fólkayvirlitstilfari kunnu latast øðrum almennum myndugleika eftir reglunum í løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum. Víðari er ásett, at tá ið ein almennur myndugleiki hevur fyri neyðini at fáa upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum, kann myndugleikin útvega sær hesar upplýsingar.

Ein myndugleiki fær upplýsingarnar annaðhvørt við at fáa atgongd til at leita í Landsfólkayvirlitinum ella við at móttaka fílur úr Landsfólkayvirlitinum. Landsstýrisfólkið ásetir treytirnar fyri at lata upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum, undir hesum treytir um

trygdartiltøk og gjøld. Er talan um stakfyrispurningar frá almennum myndugleikum, skulu hesir sendast kommunustýrinum.

Í viðmerkingunum til § 46, stk. 1 í lógini stendur, at útlendskir myndugleikar eru sum privatpersónar at rokna, tá ið ræður um lóggávuna um fólkayvirlit.

Latan av upplýsingum til útlendskar myndugleikar og harvið eisini ríkismyndugleikar í Føroyum er tí ikki fevnd av kapitli 8. Hetta merkir, at eingin heimild er at lata ríkismyndugleikum í Føroyum upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum.

Tí verður skotið upp, at nýggj áseting verður sett inn sum § 31 a, har ásett verður, at ríkismyndugleikar í Føroyum eru í kapitli 8 javnsettir við aðrar almennar myndugleikar.

Dátuverndarlógin fevnir ikki um ríkismyndugleikarnar í Føroyum. Hetta sæst greitt í viðmerkingunum til dátuverndarlógina.

Ríkismyndugleikarnir í Føroyum eru ikki "staðsettir" í ES, og eru tí ikki fevndir av GDPR. Teir eru hinvegin fevndir av persondataloven frá 1. juli 2017, sum er sett í gildi fyri Føroyar við anordning nr. 754 frá 19. juli 2017.

Tað er danska Datatilsynet, ið hevur eftirlit við, at ríkismyndugleikarnir í Føroyum halda ta aktuellu lógina um viðgerð av persónupplýsingum, sum er galdandi fyri teir.

Danska Datatilsynet vísir á, at Evropa Kommissiónin hevur góðkent Føroyar sum trygt triðjaland, men leggur afturat, at ríkismyndugleikarnir í Føroyum ikki eru fevndir av hesi góðkenning. Eisini vísir Datatilsynet á, at um persónupplýsingar skulu flytast til hesar myndugleikar, skal tað gerast sbrt. art. 46 í GDPR ella skal vísast til eitt undantak sbrt. art. 49 í GDPR. Datatilsynet staðfestir soleiðis, at ríkismyndugleikarnir í Føroyum ikki hava støðu sum "trygt triðjaland", tá talan er um flutning úr ES.

Ríkismyndugleikarnir í Føroyum eru sostatt hvørki fevndir av dátuverndarlógini ella GDPR og verða tískil bæði av Dátueftirlitinum og Datatilsynet roknaðir sum triðjaland.

Flutningur av persónupplýsingum kann uttan víðari fara fram um so er, at 1) móttakarin er fevndur av dátuverndarlógini 2) móttakarin er fevndur av GDPR ella 3) um landsstýrisfólkið hevur tikið avgerð sbrt § 60 í dátuverndarlógini um, at móttakarin hevur eitt nøktandi trygdarstøði.

Onki av hesum trimum ger seg galdandi fyri ríkismyndugleikarnar í Føroyum.

Henda staðfesting hevur við sær, at skulu upplýsingar sendast frá fólkayvirlitinum til ríkismyndugleikarnar í Føroyum, skal hetta gerast sambært reglunum í dátuverndarlógini um flutning til triðjalond o.a., sum er grundaður á fullgóða trygd. Viðkomandi reglur til hendan flutning eru tá §§ 61 og 62 í dátuverndarlógini.

Fyri at sleppa undan hesum fer Løgmálaráðið eftir tilmæli frá Dátueftirlitinum undir eina tilgongd at meta um verndarstøðið hjá ríkismyndugleikunum í Føroyum. Um tað verður mett at verða nøktandi, er ætlanin at broyta kunngerð um triðjalond, sum hava nøktandi verndarstøði viðvíkjandi flutningi av persónupplýsingum soleiðis, at Danmark, hvat ríkismyndugleikunum

í Føroyum viðvíkur, verður lagt afturat londunum, ið verða mett at hava eitt nøktandi verndarstøði.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at fáa greiða heimild til, at ríkismyndugleikar í Føroyum fáa atgongd til neyðugar upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Sambært uppskotinum fáa ríkismyndugleikar í Føroyum eins og aðrir almennir myndugleikar í Føroyum atgongd til at innheinta upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum og kunnu venda sær til kommunustýrini í sambandi við stakfyrispurningar og har fáa neyðugar upplýsingar.

Eins og galdandi er fyri aðrar føroyskar almennar myndugleikar er tað ein treyt fyri at lata upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum, at tað er eitt sakligt grundarlag fyri hesum.

Landsstýrisfólkinum er sambært § 29, stk. 2 heimilað at áseta treytirnar fyri atgongd hjá myndugleikum til upplýsingar í Landsfólkayvirlitinum, undir hesum um trygdartiltøk og gjalding.

Við uppskotinum um at loyva latan av upplýsingum úr Landsfólkayvirlitinum til ríkismyndugleikar í Føroyum, verður eisini talan um viðgerð av persónsupplýsingum.

Talan verður fyrst og fremst um upplýsingar um navn, p-tal og bústað, men harumframt kunnu eisini upplýsingar um t.d. ríkisborgararrætt, møguligan limaskap í fólkakirkjuni og ættarsamband verða viðgjørdar. Upplýsingar, sum eru í skránni hjá Landsfólkayvirlitinum, eru nevndar í fylgiskjali 1 til galdandi løgtingslóg um fólkayvirlit.

Ætlaða lógarbroytingin er í høvuðsheitum fevnd av § 8, stk. 1, nr. 5 í dátuverndarlógini, sum loyvir viðgerð av persónsupplýsingum, um viðgerðin er neyðug til tess at røkja samfelagsáhugamál ella uppgávur, sum liggja undir almennari myndugleikaútinnan, sum dátuábyrgdaranum er áløgd.

Nakrar av teimum upplýsingunum, sum eru fevndar av fylgiskjali 1, eru at rokna sum viðkvæmar upplýsingar. Tað eru upplýsingar um revisverd viðurskifti og um átrúnaðarliga sannføring.

Viðv. revsiverdum viðurskiftum broytist bústaðarskrásetingin sambært § 13 í løgtingslóg um fólkayvirlit ikki beinleiðis av, at ein persónur fer inn at sita. Hesi serligu viðurskiftini verða tó skrásett sum ein viðmerking í Landsfólkayvirlitinum, til tey eru endað. Hesar upplýsingar eru tó ikki atkomuligar umvegis Heldina, sum er eitt felags, trygt og bronglað samskiftisundirstøðukervi, sum ger tað møguligt hjá almennum og privatum stovnum og fyritøkum at skifta dátur sínámillum. Heldin virkar sum ein óheftur boðberi, ið flytur dátur beinleiðis millum luttakarar, uttan at kanna ella goyma innihaldið, og tryggjar, at samskiftið fer fram á ein hátt, sum er álítandi og vart móti óviðkomandi atgongd.

Sambært § 13, stk. 2 ásetir landsstýrið eftir samráðing við avvarðandi myndugleika nærri reglur um fráboðan og skráseting í Landsfólkayvirlitinum av persónum, ið stk. 1 fevnir um. Hendan kunngerðarheimildin er ikki nýtt.

Sambært dátuverndarlógini eru upplýsingar um átrúnaðarliga sannføring eisini at rokna sum viðkvæmar upplýsingar. Hetta fevnir um upplýsingar, sum verða skrásettar í Landsfólka-yvirlitinum um limaskap í fólkakirkjuni. Sambært viðmerkingunum til dátuverndarlógina má støða tó takast í hvørjum einstøkum føri.

Viðgerð av viðkvæmum persónsupplýsingum er sum meginregla bannað, uttan so at beinleiðis heimild er fyri hesum í §§ 12-14 ella §§ 18-19 í dátuverndarlógini.

Latanin av upplýsingum til ríkismyndugleikar í Føroyum er treytað av, at myndugleikin hevur sakligan tørv á upplýsingunum í samband við sítt arbeiði.

Harumframt skulu ríkismyndugleikarnir í Føroyum viðgera upplýsingarnar úr Landsfólka-yvirlitinum sambært galdandi lóggávu.

Dátuverndarlógin fevnir ikki um ríkismyndugleikar í Føroyum. Hetta sæst greitt í viðmerkingunum til dátuverndarlógina.

Ríkismyndugleikarnir í Føroyum eru ikki "staðsettir" í ES, og eru tí ikki fevndir av GDPR. Teir eru hinvegin fevndir av persondataloven frá 1. juli 2017, sum er sett í gildi fyri Føroyar við anordning nr. 754 frá 19. juli 2017. Danska Datatilsynet hevur eftirlit við, at ríkismyndugleikarnir í Føroyum halda ta aktuellu lógina um viðgerð av persónupplýsingum, sum er galdandi fyri teir.

Mett verður, at ætlaða broytingin kann fremjast innan karmarnar av galdandi lóggávu, og at viðgerðin er saklig, neyðug og í rímiligum lutfalli við tey mál, sum verða roynd at røkka við lógaruppskotinum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið er lagt á almenna hoyringarportalin og á heimasíðuna hjá Løgmálaráðnum til almenna hoyring.

Uppskotið er sent beinleiðis til ummælis hjá:

- Ríkisumboðnum
- Føroya Rætti
- Føroya Politi
- Kriminalforsorgini
- Landslæknanum
- Arktisk kommando
- Søfartsstyrelelsen
- Talgildu Føroyum
- Dátueftirlitinum
- Umhvørvisstovuni
- Stjórnarráðunum

Ummælistíðin var frá 3. september 2025 til 1. oktober 2025.

Tá ið ummælisfreistin var úti, vóru viðmerkingar komnar frá Dátueftirlitinum.

Dátueftirlitið vísir á, at lógaruppskotið hevur til endamáls at geva ríkismyndugleikunum í Føroyum atgongd til upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum. Dátueftirlitið tekur undir við, at ríkismyndugleikar kunnu veita borgarum sínar tænastur talgilt, men vísir á tvær grundleggjandi fortreytir:

Heimild/viðgerðargrundarlag:
Við uppskotinum verða ríkismyndugleikar í Føroyum javnsettir við aðrar almennar myndugleikar, og sostatt er heimild sambært dátuverndarlógini til at lata teimum upplýsingar. Henda fyrra fortreyt verður mett at vera uppfylt.

Trygd/ flutningur av persónupplýsingum:
Flutningur av upplýsingum til ríkismyndugleikar í Føroyum er meira fløktur. Teir eru hvørki fevndir av føroysku dátuverndarlógini ella GDPR og hava tí ikki støðu sum "trygt triðjaland." Tí krevur slíkur flutningur serligar trygdarreglur sambært §§ 61–62 í dátuverndarlógini.

Dátueftirlitið staðfestir, at lógaruppskotið gevur neyðugu heimildina men tekur ikki støðu til spurningin um flutning til ótrygg triðjalond. Hetta merkir, at hóast heimild er givin, so má flutningurin til ríkismyndugleikar framvegis lúka reglurnar fyri flutning til ótrygg triðjalond.

Dátueftirlitið mælir tí til, at Løgmálaráðið fer undir eina tilgongd at meta um verndarstøðið hjá ríkismyndugleikunum í Føroyum. Um tað verður mett at verða nøktandi, verður mælt til at landsstýrismaðurin broytir kunngerð nr. 175 frá 16. desember 2020 um triðjalond, sum hava nøktandi verndarstøði viðvíkjandi flutningi av persónupplýsingum, sum broytt við kunngerð nr. 62 frá 4. mai 2022 og leggur Danmark, hvat ríkismyndugleikunum í Føroyum viðvíkur, afturat londunum, ið verða mett at hava eitt nøktandi verndarstøði

Víst verður til ummælisskrivið frá Dátueftirlitinum og til pkt. 1.2. um galdandi lóggávu í almennu viðmerkingunum til hetta lógaruppskotið.

Løgmálaráðið tekur viðmerkingarnar frá Dátueftirlitinum til eftirtektar og arbeitt verður saman við Dátueftirlitinum at fáa eina loysn viðvíkjandi góðkenning av ríkismyndugleikunum í Føroyum.

Justitsministeriet hevur innheintað ummæli frá Domstolsstyrelsen, Direktoratet for Kriminalforsorgen og Rigspolitiet.

Domstolsstyrelsen hevur innheintað eina frágreiðing frá Føroya Rætti, sum vísir á, at uppskotið gongur tørvinum hjá rættinum á møti, tá tað snýr seg um atgong til og nýtslu av upplýsingum í Fólkayvirlitinum, undir hesum til talgild samskifti.

Víst verður tó á, at tað er ein treyt fyri víðari talgilding av Føroya Rætti, at rætturin verður javnsettur við føroyskar almennar myndugleikar, tá tað ræður um atgongd til og nýtslu av upplýsingum í øðrum føroyskum yvirlitum enn Fólkayvirlitinum. Tí verður tørvur á lóggávu, sum gevur Føroya Rætti atgongd til m.a. Vinnuskránna (V-tal gjøgnum Heldina), skattaupplýsingar (TAKS) og tinglýsingarupplýsingar. Fyrivarni verður tikið fyri, at kanningararbeiði kann vísa á tørv á upplýsingum úr øðrum føroyskum yvirlitum.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at hetta lógaruppskotið bara snýr seg um atgongd hjá ríkismyndugleikum í Føroyum til upplýsingar í Landsfólkayvirlitinum. Tað er Fíggjarmála-

ráðið, sum varðar av vinnuskránni og TAKS, meðan Umhvørvismálaráðið varðar av tinglýsing. Tað eru tískil ávikavist Fíggjarmálaráðið og Umhvørvismálaráðið, sum skulu taka støðu til atgongd til hesar upplýsingar.

Direktoratet for Kriminalforsorgen vísir á, at sambært anordning nr. 754 av 19. juni 2017 om ikrafttræden af lov om behandling af personoplysninger for rigsmyndighedernes behandling af oplysninger på Færøerne, sum broytt við anordning nr. 1034 frá 29. juni 2022 galda serligar reglur fyri viðgerðina av persónupplýsingum hjá ríkismyndugleikunum, í teimum førum har dataverndarlógin og ikki rættarhandhevingslógin er galdandi.

Løgmálaráðið tekur hetta til eftirtektar.

Rigspolitiet vísir á, uppskotið ikki gevur høvi til at koma við viðmerkingum, av tí at tað av viðmerkingunum til lógaruppskotið framgongur, at tað eru ríkismyndugleikarnir sjálvir, sum ynskja at nýta atgongdina, ið skulu menna tær tøkniligu sambindingarnar, ið eru neyðugar fyri at fáa atgongd til upplýsingarnar í fólkayvirlitinum.

Løgmálaráðið hevur ikki viðmerkingar til hetta.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

Teir ríkismyndugleikar, sum gera gagn av hesari atgongd, skulu menna tað knýtið, sum krevst fyri at fáa atgongd til upplýsingarnar í Landsfólkayvirlitinum.

Um myndugleikarnir skulu hava atgongd til upplýsingarnar umvegis Heldina, eru útreiðslur til menning og uppseting fyri at kunna nýta og móttaka upplýsingar umvegis Heldina. Hetta er útreiðslur, sum myndugleikin rindar sjálvur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Teir ríkismyndugleikar, sum gera gagn av hesari atgongd, skulu menna tað knýtið, sum krevst fyri at fáa atgongd til upplýsingarnar í Landsfólkayvirlitinum.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið er ikki í andsøgn við Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættindasáttmálan (EMRS) ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Sambært uppskotinum verða ríkismyndugleikar í Føroyum javnsettir við føroyskar myndugleikar, tá tað snýr seg um atgongd til upplýsingar í Landsfólkayvirlitinum. Uppskotið er sostatt við til at avtaka ávísar markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir og ger ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skatt ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið heimilar ríkismyndugleikum í Føroyum atgongd til upplýsingar í Landsfólkayvirlitinum. Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur við sær, at Løgmálaráðið fer undir eina tilgongd at meta um verndarstøðið hjá ríkismyndugleikunum í Føroyum. Um tað verður mett at verða nøktandi, er ætlanin at broyta kunngerð um triðjalond, sum hava nøktandi verndarstøði viðvíkjandi flutningi av persónupplýsingum soleiðis, at Danmark, hvat ríkismyndugleikunum í Føroyum viðvíkur, verður lagt afturat londunum, ið verða mett at hava eitt nøktandi verndarstøði.

Hetta tí at dátuverndarlógin ikki fevnir um ríkismyndugleikar í Føroyum, og tí at ríkismyndugleikar í Føroyum ikki hava støðu sum trygt triðjaland.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndugleikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Ásett verður, at ríkismyndugleikar í Føroyum verða javnsettir við aðrar almennar myndugleikar. Hetta verður gjørt við at seta inn eina nýggja grein 31 a í kapitli 8 í løgtingslógini.

Við hesum kunnu ríkismyndugleikar í Føroyum, eins og aðrir føroyskir myndugleikar, fáa upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum. Ríkismyndugleikar í Føroyum fara soleiðis at kunna fáa upplýsingar um til dømis navn, bústað, føðistað, hjúnastøðu, persónsnummar, ættarsamband o.a., umframt møguligar søguligar upplýsingar um skrásettu dáturnar.

Upplýsingar, sum eru í skránni hjá Landsfólkayvirlitinum, eru nevndar í fylgiskjali 1 til galdandi løgtingslóg um fólkayvirlit.

Atgongdin til at fáa upplýsingar úr Landsfólkayvirlitinum er treytað av, at myndugleikin hevur sakligan tørv á upplýsingunum í samband við sítt arbeiði. Harumframt skulu ríkismyndugleikarnir í Føroyum viðgera upplýsingarnar úr Landsfólkayvirlitinum sambært persondataloven.

Dátuverndarlógin fevnir ikki um ríkismyndugleikar í Føroyum. Hetta sæst greitt í viðmerkingunum til dátuverndarlógina.

Ríkismyndugleikarnir í Føroyum eru ikki "staðsettir" í ES, og eru tí ikki fevndir av GDPR. Teir eru hinvegin fevndir av persondataloven frá 1. juli 2017, sum er sett í gildi fyri Føroyar við anordning nr. 754 frá 19. juli 2017.

Danska Datatilsynet hevur eftirlit við, at ríkismyndugleikarnir í Føroyum halda ta aktuellu lógina um viðgerð av persónupplýsingum, sum er galdandi fyri teir. Ein ríkismyndugleiki í Føroyum er ein almennur myndugleiki, sum umboðar danska statin í málsøkjum, sum framvegis hoyra undir ríkismál, tað vil siga økir, har ábyrgdin ikki er flutt til føroyska sjálvstýrið sambært heimastýrislógini.

Ríkismyndugleikar í Føroyum eru Ríkisumboðið, Føroya Politi, Føroya Rættur, Kriminalforsorgin, Landslæknin og Arktisk kommando.

Stovnar, feløg o.a., sum er skipað á privatrættarligum grundarlagi, fella sum heild uttan fyri almennu fyrisitingina og verða mett at vera privat. Hetta er galdandi uttan mun til, um tað virksemið, sum verður framt, kann javnsetast við tað, sum vanliga verður rikið av fyrisitingarmyndugleikum, ella verður rikið eftir boðum frá ella avtalu við ein fyrisitingarligan myndugleika.

Til § 2
Gildiskomuáseting. Ásett verður, at lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Løgmálaráðið, 28. november 2025

Bjarni K. Petersen
landsstýrismaður

/ Nella Festirstein

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Ummæli frá Dátueftirlitinum
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Justitsministeriet